Frits Johannesen á summarstevnu á Selatrað:

# Vit hava brúk fyri sterkari javnaðarhugsjón

**– Javnvág má vera í fyri at fáa eitt litríkt samfelag, sum gott er at búgva í – eitt samfelag har javnbjóðis hugsanir kunnu vera í sæti, og um tú ert likamliga skerdur, so er okkara skylda at bera so í bandi, at førleikin ikki verður skammfarin vegna skeivar avgerðir. Hetta er vert at stríðast fyri, og mong hava offrað seg fyri hesi søk segði Frits Johannesen, sum helt fyri, at vit hava brúk fyri sterkari javnaðarhugsjón undir øllum viðurskiftum, í øllum ávikum og í øllum londum**


*Alt ov nógva staðni er bál og brandur av eirindaleysum orrustum millum átrúnað, etniskar bólkar, politiskar fatanir og ikki minst millum ník og fátæk, skrivar Frits Johannesen millum annað*

SUMMARSTEVNA

Fíggjadagin og leygardagin helt Javnaðarflokkurin summarstevnu á Selatrað. Fólk kring alt landið høvdu leitað sær til skótadepilin hjá KFUM í vakra umhvørvinum á Selatrað at hugna sær og skifita orð um politikk. Høvuðsrøðarin á stevnuni var eingin minni enn listamaðurin Frits Johannesen úr Fuglafirði. Fríggjakvøldið var bálið tendrað og Frits fekk orðið.

– Fleiri stórar bygdir hava sett sær sum mið og mál at hava eina summarstevnu, har ítróttur og mentanartiltøk hvørt um annað seta dám á bygdinar einar tveir dagar á hásumri. Hetta er ikki nakað nýtt í føroyskum mentanarlívi, at fólk koma saman t. d. at dansa. Vit kenna hugtakið nýggjársbygd, kyndilsmessubygd, jólabygd o.s.fr. Tá fóru fólk bygdanna millum at leita upp vinir, kenningar, familju og at treða dansin. Ung hittust. Genta og drongur blivu skotin hvørt í øðrum – blivu góð – blivu maður og kona, hann norðast og hon sunnast av oynni, ella øvugt. Eisini hava vit dømi um, at sami leikur fór fram millum gentu og drong – hon norðast og hann sunnast av landi.

Vit eru fáment, og færri vóru vit fyri 100, 200 árum síðani, og at tað er at undrast yvir, at vit eru so fræg, sum vit eru. Arvur hevur ikki darvað okkum sum so, at vit fingu seks fingrar á hvørjari hond, tríggjar tær á hvørjum føti, og Sára, av Selatrað... var hon ikki von og tekkilig?

Hetta er eins fyri tjóðveldisfólk, sambandsfólk, fólkafloksfólk, sjálvstýrisfólk og javnaðarfólk. Ikki hevði tað sømt seg fyri eitt upplýst fólk, um so var, at vit fóru at bólka fólk eftir, hvussu nógvar tær tey høvdu á hvørjum føti, og hvussu nógvar fingrar, tey høvdu á hvørji hond t. d. at sambandsfólk skuldu bert hava tríggjar tær á hvørjum føti og tjóðveldisfólk seks fingrar á hvørjari hond. Hetta hevði verið ósømiligt og mannminkandi fyri okkum sum eitt mentað fólk. Vit kundu eisini sagt: Fyri at vera eitt javnaðarfólk skuldi tú viga millum 40 og 50 kg, og hetta skuldi vera í naknum líki. Fólkafloksfólk skuldu hava reytt hár, miðflokkafólk skuldu hava tatoveringar um allan kroppin, og fólk úr Gamla Sjálvstýrinum skuldu hava violett hár í bakborð og gult í stýriborð.

Peikifingurin hevði verið á lofti, sóust hesi fólk á gøtuni: Har kemur ein Lisbet á trimum tóm, har kemur Annfinn Kalsberg undir reyðum parúkki, har kemur Høgni Hoydal við 12 fingrum, Kári Højgaard so litríkur, Jenis av Rana sum ein livandi skulpturur við tatoveringum um allan kroppin, og onkur hevði sagt, at tað var ivingarsamt, um Jóannes Eidesgaard var funnin ov tungur, og tí mátti fara úr Javnaðarflokkinum.

Hvat við teimum, sum einki merki høvdu?

Um seyð, sum einki mark hevur, verður sagt, at hann hevur kópamerki. Ja, men so vórðu hesi fólk bólkað í tann flokkin, ið fekk heitið Kópaflokkurin.

Hesin flokkur var oportunistiskur – fór tann vegin, sum vindurin blásti. Onkuntíð hildu tey við teimum, sum høvdu 3 tær á hvørjum føti, av og á við teimum, sum høvdu reytt hár, við hvørt við teimum litríku, teimum tatoveraðu og teimum, sum høvdu vektina í lagi. Nú kundi flokkurin ikki longur bera heitið Kópaflokkurin, men Flokkur Teirra Litríku-fingramongu-trítærnaðu-tatoveraðu-vágafúsu. Hetta var tað nýggja navnið í tí politisku orrustuni.

Tey funnu saman at minna hvørt annað á, at lívið var litríkt, og og tá var høvuðstalarin Kári Post. Tú vart gonguførur/før, hóast tríggjar tær á hvørjum føti, høvuðsrøðari Lisbeth Petersen. Fyrilestur av Annfinn Kallsberg: Lívið er steindeytt, er tað ikki reytt. Doktara ritgerð av Høgna Hoydal: Vit klára okkum fínt við 12 fingrum, og Jóannes Eidesgaard: Vágaskálina til fólkið! Fyrilestur av Jenis av Rana: Tatoveringin er til gangs fyri sál og likam.

Ein dag kom ein »healari« í flokkin – ein grøðari. Hóast flokkurin var settur saman av so ymiskum fyribrigdum, so rakk hetta ikki langt. Hesin misjavni, sum var í útsjónd, var ein bági fyri flokkin, tá ið hann á fríum, frælsum forrætningsprinsippum skuldi selja seg sjálvan í fjøllmiðlunum – ein syndarlig sjón – tríggjar tær, seks fingrar, reyðir parúkkar, litað hár, tey tatoveraðu, og so tey við eini vekt undir arminum. Alt var ein perivellingur, sum eingin fekk skil á – hvørki leikur ella lærdur.

»Healarin« kyndi stórt bál og vildi mana henda ójavna til heljar. Hann kom við sínum rúnarkervi og risti í klettar, gjáir, láir, túvur og teigar og segði nøkur óskiljandi orð, sum var eitt brongl, men væl munti. Ein umbroyting fór fram, øll komu at síggja eins út. Tað fór eitt suð ígjøgnum flokkin. Fingrar, tær, litað hár, tatoveringar og vektir flugu um oyruni á fólki og fór lúkst í bálið. Bálið neistaði, stórar eldtungur róptu til himmals og dansaðu ein løgnan elddans á tí bláa himmalhválvinum. Onkur hevði hoyrt eina rødd, sum ljómaði úr bálinum:

Litríkufingramongutrítærnaðutatoveraðuvágafúsu

Litríkufingramongutrítærnaðutatoveraðuvágafúsu

Litríkufingramongutrítærnaðutatoveraðuvágafúsu

tit skulu brennast og týnast, tí nú skulu vit hava flokk teirra reinu – so kumlað og snoðin skulu øll vera, øll skulu ganga í svørtum klæðum, skallaklipt og bert, bert aleina skuldi tað vera loyvt, sum flokkurin góðtók.

Uppi á einum heyggi skamt ífrá, stóðu Høgni Hoydal, Lisbeth Petersen, Anfinn Kallsberg, Jóannes Eidesgaard, Jenis av Rana og Kári P. Højgaard og vóru eitt sindur ørkymlað og høvdu ringan smakk í munninum. Hvørji ráð vóru nú til at taka?

Tey hugdu hvørt upp á annað, og Anfinn Kallsberg helt: Skulu vit ikki vera fólkafloksfólk mánadag, sambandsfólk týsdag, Gamla sjálvstýrið mikudag og Jenis av Rana vildi hava hósdag sum sín dag, og Jóannes Eidesgaard mælti øllum til at vera javnaðarfólk fríggjadag ...og her standa vit ...vit javnaðarfólk og brenna bál eitt fríggjakvøld seint á sumri 2003.

At vera javnaðarfólk ein dag um vikuna reinsar kanska samvitskuna eitt sindur, men skal tað muna í verki, so skal annar løgur til.

Kring tann víða heim ofra fólk seg fyri síni søk bæði so og so. Vit hoyra um fólk, sum geva seg til fulnar fyri friðarsakini fyri at bøta um korini hjá fæloysingum, veita ein linna, har, sum neyðin leikar á – summi týna lív og onnur royna at geva lív. Alt ov nógva staðni er bál og brandur av eirindaleysum orrustum millum átrúnað, etniskar bólkar, politiskar fatanir og ikki minst millum rík og fátæk. Í gjáramorgunin hoyrdist í útvarpinum at 30.000 fólk vóru týnd í Argentina frá 1974 og úteftir, tí tey vóru vinstrahall og andsfrøðingar – sjálvt USA styðjaði hetta. Tá ið kapitalismunar búmerki – World Trate Center – fór í sor, og 3500 fólk doyðu, sum jú sjálvandi er ein sorgarleikur, helt presturin Leif Jarle Theis í Sund kirkju í Sudra skamt frá Bergen talu í norska útvarpinum NRK nakað eftir hesa hending. Hann segði: Somu fólk, sum drupu høvur á minningarhátíðini í stillari bøn yvir teimum, sum fórust í hesi eirindaleysu týning, tosaðu um hevnd, tá ið tey lyftu høvur aftur. »Hevndini stýrir ein annar,« segði prestur henda dag. Hevnd í kristnari hugsan, er máttloysi. Tá ið Pætur treiv til svørðið í Getsemane og høgdi oyrað av Malkusi, tók Jesus soleiðis til orðanna.

»Tí at allir teir, ið taka til svørðs, skulu falla fyri svørði!«

At taka sín kross og bera hann fyri onnur er symbolið upp á tolsemi, kærleika, rættvísi, offurvilja og bót. Her hugsi eg um t. d. Nelson Mandela, sum sat 26 ár í fangalegu fyr at loysa Suður Afrika úr apartheid politikkinum. Hann kom út aftur og søkti sátt og semju við valdsharrarnar. Við sínum einkla verumáta fekk hann fjøldirnar at sissa seg og ikki at leypa framav. Hann brúkti bert nøkur fá orð, sum fingu hóparnar at ganga inn í seg sjálvar og fremja verkið í tí tímiliga til bata fyri øll. Móðir Theresa royndi at javna í tí fólkaríka India, har neyðin sártnar fyri eygunum á mongum. Ella hvat heldur tú Mikes Theodorrakis, sum við sínum mergjaða tónleiki fann vegin til tey grisku hjørtuni við rótum í griskum fólkatónleiki, har bouzoukiljóðførið var skotvápnið ímóti valdsharrunum og juntaini? Hesi fólk eru farin ígjøgnum bál og brand fyri at fremja hugsan sína og sáa ein boðskap í fólkasálina um egið trúvirði og vilja at berjast fyri rættvísi fyri sær og sínum, landi og fólki at gagni.




*Áhoyrararnir fylgdu væl við, tá røtt varð um ymisk samfelagsviðurskifti*

**Sangur fyri frælsi**

Tað finst eitt hav sum eingin sær
Tað finst ein grøv har eingin doyr
Tað finst ein sól ei fer í kav
Tað finst ein strond í hvørji sál

Og forløg tíni skilir tú
um skðggjað loft, tá lðsna fer,
so bygg ein heim, ein heim at liva í
Tað stendur um títt lív, títt egna lív!

Tað finst ein verð sum sindrast ei
Tað finst eitt bræv sum eingin las
Tað finst ein kyld sum skilir alt
Tað finst eitt frælsi uttan sár

Syngur Mikes Theodorakis í yrkingini, ið ber heiti: Sangur fyri frælsi.

Jú, sanniliga eru tað mangir valdsharrar, ið hava skamlop í sálum sínum... har sálin er misslitað, hava 11 fingrar á hvørji hond , tatoverað um allan kroppin, tríggjar tær á hvørjum føti og vektin er ivingarsom.

Javnvág má vera í fyri at fáa eitt litríkt samfelag, sum gott er at búgva í – eitt samfelag har javnbjóðis hugsanir kunnu vera í sæti, og um tú ert likamliga skerdur, so er okkara skylda at bera so í bandi, at førleikin ikki verður skammfarin vegna skeivar avgerðir. Hetta er vert at stríðast fyri, og mong hava offrað seg fyri hesi søk.

Hetta eru høg mál at røkka, men lat ikki alt fara upp í royk av snerpnum hugsjónum, politiskum síðlembingum, afturhaldssinnaðari borgarligari lognbrá, krígsgreðingum, mentanarmisrøkt o.s.fr. Vit hava brúk fyri sterkari javnaðarhugsjón undir øllum viðurskiftum, í øllum ávikum og í øllum londum. Verð fattur/fatt í herðunum – ber høvur høgt, tá ið neistin av degi javnaðarmanna skal fremjast í verki.

Var Sára ikki av Selatrað, tænti hon ikki í Tjørnuvík var drongurin ikki úr heilt aðrari bygd – kanska sunnast av landi, og tey hittust í Plantasjuni, og tí fingu tey ein sprellibassa, sum æt Finn? Eg ivist onga løtu í, at hetta vóru góð javnaðarfólk, sum javnan verður sungið um enn tann dag í landi okkara.

Góða javnaðarstevnu við bál og brandi!

**Frits Johannesen**


*Fólk kring alt landið høvdu leitað sær til skótadepilin hjá KFUM í vakra umhvørvinum á Selatrað at hugna sær og skifita orð um politikk*